# Føroyingur setast í prestastarvið í Hull

**– Tað varð hildið at vera ein sjálvfylgja, at ein føroyingur varð settur í sjómansprestastarvið í Hull frá byrjan, men tað hendi ikki. Nakað av skriving hevur verið um málið í Sosialinum í seinastuni, og róð hevur verið framundir, at føroyska sjómanskirkjan og Mentamálastýrið ikki hava røkt føroysk áhugamál nóg væl, tá ið ein dani var settur í starvið. Tórbjørn Jacobsen fer at reisa spurningin á tingfundi í dag**

SJÓMANSKIRKJAN

*Eirikur Lindenskov*

*eirikur@sosialurin.fo*

– Nær fer verandi sáttmáli millum føroysku sjómanskirkjuna og donsku sjómanskirkjuna úr gildi? og eru samráðingar millum partarnar um at halda fram við samstarvinum?

Hesar spurningar vil Tórbjørn Jaocbsen, løgtingsmaður, hava Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann í mentamálum at svara á tingfundinum í dag.

Tórbjørn Jacobsen sigur eisini, at føroyski skattgjaldarin borgar fyri sjómansprestasvarvið, ið sambært verandi sáttmála er mannað í Hull í Bretlandi og spyr, um landsstýrismaðurin, sum umsitur játtanina, ætlar at skipa so fyri, at tað frameftir verður ein føroysku prestur, ið mannar starvið.



*Hjørdis Kjærsgaard er sjómansprestur í Hull*

Løgtingsmaðurin vísir á, at sáttmáli um samstarv millum føroysku og donsku sjómanskirkjuna var gjørdur fyri fáum árum síðani.

– Talan er um eitt nýbrot, har føroyskur prestur skuldi sendast út í heim at virka, tó í skipanini hjá donsku sjómanskirkjuni, sigur hann.

Føroya Landsstýrið tók undir við málinum, og síðani hevur ein játtan verið tøk á fíggjarløgtingslógini til hetta endamálið.

– Tað varð hildið at vera ein sjálvfylgja, at ein føroyingur varð settur í starvið frá byrjan, men tað hendi ikki. Nakað av skriving hevur verið um málið í Sosialinum í seinastuni, og róð hevur verið framundir, at føroyska sjómanskirkjan og Mentamálaráðið ikki hava røkt føroysk áhugamál nóg væl, tá ið ein dani var settur í starvið hjá føroysku sjómanskirkjuni í Hull, vísir Tórbjørn Jacobsen á.

Hann vónar, at landsstýrismaðurin hevur eina meining um hetta málið, og væntandi fer hann at krevja av pørtunum, at játtanin, hann umsitur, verður brúkt til at seta ein føroying í hetta starvið, um so er, at samstarvið ímillum sjómanskirkjurnar báðar, yvirhøvur skal halda fram.

# Tænir oljuavgjaldið bara landskassanum?

**John Johannessen, løgtingsmaður, vil hava Bárð Nielsen, fíggjarmálaráðharra, at greiða løgtinginum frá, um nakar samanhangur er millum oljuavgjaldið og umhvørvisvernd**

OLJUAVGJALDIÐ

*Eirikur Lindenskov*

*eirikur@sosialurin.fo*




*John Johannessen vil hava landsstýrismannin í fíggjarmálum at greiða frá, um nakað samanhang er millum oljuavgjaldið og umhvørvisvernd. Hann vísir á dømi úr Danmark, har orkuprísur ikki verður lækkaður, tí statskassin missir inntøku*

– Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógvir pengar vantandi koma inn í oljuavgjaldi í ár og hvussu stórur partur av hesum verður brúktur beinleiðis til orku- og umhvørvisátøk? Hendan spurning vil John Johannessen, løgtingsmaður, hava Bárð Nielsen, landsstýrismann at svara á tingfundinum í dag.

Hann spyr eisini landsstýrismannin, um tað er rætt skilt, at meginreglan við umhvørvisgjøldum er at betra um umhvørvisstøðuna? Um so er, kann landsstýrismaðurin so greina tinginum, hvussu oljuavgjaldið hevur gagnað umhvørvinum seinastu árini, spyr John Johannessen.

Eisini spyr hann Bárð Nielsen, um landsstýrismaðurin at enda kann greiða tinginum frá, hvussu hann í framtíðini kundi hugsað sær at samskipa umhvørvisgjøld og umhvørvispolitikk?

– Eingin ivi skal vera um, at tað er bæði rætt og skilagott at hava ávís umhvørvisgjøld, væl at merkja um hesi tæna umhvørvinum og eru sosial rættvís. Men í seinastuni hevur orðaskifti tikið seg upp um oljuavgjaldið upp á 70 oyru lulturin, sum øll eru noydd at gjalda, skulu tey hava hita í húsinum. Hetta líkamikið um talan er um pensjónistar, einligar mammur ella fólk við milliónа inntøkum, sigur John Johannessen.

Hann vísir á, at hetta sama brennioljuavgjaldið verður sagt at vera eitt umhvørvisgjald, ið hevur til endamáls at minka um oljunýtsluna og tæna umhvørvinum.

– Men so greitt er motivið við slíkum gjøldum ikki altíð, heldur hann.

John Johannessen sigur, at í Danmark hava tey eitt líknandi avgjald á biogassi, sum fjarhitamiðstøðir kring alt landið nýta. Hetta avgjaldið gevur milliarda inntøkur í danska statskassan. Nú ynskja hitamiðstøðirnar at gerast meira umhvørvisvinarligar við at leggja um frá luftdálkandi biogassinum til bíligan og umhvørvisvinarligan hálm, ið er til avlops fra danska landbúnaðinum.

– Hetta gleðir ikki danska fíggjarmálaráðharran. Umhvørvisvinarliga orkuframleiðslan gevur ov lítið í statskassan av umhvørvisgjøldum. Tískil hevur danska stórnin gjørt av at banna hitamiðstøðunum at leggja um til hálm. Grundgevingin er, at stjórnin ikki vil missa 700 milliónir krónur í umhvørvisavgjøldum.

– Niðurstøðan av hesum má sostatt vera, at endamálið hjá donsku VK stjórnini við umhvørvisgjøldum er, at tey skulu tæna kassanum og ikki umhvørvinum, sigur John Johannessen.

Hann sigur seg ikki hava klárað at funnið nakran beinleiðis samanhang ímillum okkara umhvørvisgjøld og beinleiðis tiltøk at betra um umhvørvið. Tí verður hesin fyrispurningurin settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, fyri at fáa greiðu á, um okkara umhvørvisgjald er til fyri at tæna umhvørvinum ella kassanum.

# Meira kann gerast fyri at verja ozonlagið

**Í Føroyum fara nógv tons av evnum, sum niðurbróta ozonlagið, óneyðugt út í luftina. Tess tynri ozonlagið er, jú størri er vandin fyri skaðum, t. d. økist vandin fyri húðkrabba**

OZONLAGIÐ

Meginparturin av evnunum, sum niðurbróta ozonlagið, og sum verða brúkt í Føroyum, eru kølievni, sum verða brúkt í køliskipanum, bæði á landi og umborð á skipum.

Fyri fyrstu ferð er føroysk uppgerð gjørd yvir nýtslu og útlát av evnum, sum niðurbróta ozonlagið. Uppgerðin er fyri ár 2003. Hetta árið varð meira innflutt av kølievninum HCFC-22 enn brúk er fyri í landinum.

Stóri innflutningurin skyldast eina stóra nýtslu av kølievnum umborð á skipum. Nógv skip hava eldri og ótættar HCFC-22 køliskipanir. Tá ið HCFC-22 lekur út, fer tað upp í lofthavið, og er har við til at niðurbróta ozonlagið. Hetta ger sítt til, at føroyski innflutningurin av kølievnum og føroyska útlátið av kølievnum er óneyðuga stórt. Ein onnur orsøk til stóru føroysku nýtsluna er, at í Føroyum eru kølievni bíligari enn í grannalondum okkara. Hetta tí at eingin avgjøld eru á kølievnum. Hetta førir við sær, at útlendsk skip keypa kølievni í Føroyum, og eru tey soleiðis við til at økja um føroyska innflutningin.

Ístaðin fyri áhaldandi at keypa nýggj kølievni, áttu eldru HCFC-22 køliskipanirnar at verið skift út við nýggjari og meira umhvørvisvinarliga tøkni. Ein máti at fáa gongd á hesa útskifting er at seta avgjøld á skaðilig kølievni.

Hetta er nakað av tí, sum kemur fram í kanning, sum danska ráðgevaravirkið PlanMiljø, í samstarvi við Heilsufrøðiligu starvsstovuna, hevur staðið fyri.

# Semja um bjálving í Norðoyatunlinum

**Nú er semja um, at tær umstríddu PE mátturnar kunnu nýtast í tunlinum, men at nýtslan skal avmarkast**

BRUNATRYGD

*Eirikur Lindenskov*

Brunaumsjón landsins og P/F Norðoyatunnilin hava saman við Fiskimálaráðnum viðgjørt ósemjuna, sum í summar tók seg upp millum partarnar um nýtsluna av bjálvingarevni í Norðoyatunlinum

Partarnir hava arbeitt við at finna alternativ til PE máttur, og eru samdir um:

1) at tað ikki slepst heilt undan at nýta PE máttur,

2) at nýtslan av PE máttum skal avmarkast í størst møguligan mun,

3) at neýug stig verða tikin til tess at tryggja, at har PE máttur verða nýttar, skal betonglag undir neyvum eftirliti verða lagt uttaná í fyriskrivaðari tjúkd.

Partarnir eru somuleiðis samdir um, at P/F Norðoyatunnilin, har tað letur seg gera, viðger tunnilin við øðrum bjálvingarevni, sum verður sprænt uppá. Vísandi til frammanfyri nevndu semju hevur Brunaumsjón landsins í dag tikið aftur kravboð síni.

Í skrivi dagfest 11. juli 2005, og P/F Norðoyatunnilin hevur tikið aftur kæruna, sum varð latin Fiskimálaráðnum í skrivi dagfest 13. juli 2005.